# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Snøgt sagt, so vóru vit ikki nóg hvassir á seinasta triðinginum av vøllinum, og tað kostaði okkum dýrt*

*Sir Alex Ferguson, venjari hjá Manchester United*

# Væleydnað FK-kapping fyri yngri deildir

**Vinnarar gentur:**
**Gentur 16 ár:**
Nr. 1: Fleyr
Nr. 2: SÍ
Nr. 3: KÍF



**Gentur 14 ár:**
Nr. 1: Fleyr a
Nr. 2: Mjølnir a
Nr. 3: KÍF a
Tíanverri er ongin mynd av gentur 14 ár

**Gentur 12 ár:**
Nr. 1: TB a
Nr. 2: TB b
Nr. 3: TB d



**Gentur 10 ár:**
Nr. 1: Fleyr a
Nr. 2: ÍF a
Nr. 3: TB a





**Kvinnurunglingar:**
Nr. 1: KÍF
Nr. 2: SÍ
Nr. 3: Dráttur

*Fleyr gjørdist stóri vinnarin hjá gentunum, tá tær vunnu heili tríggjar kappingar. Men kappingina hjá kvinnuunglingum vunnu kollfirðingar. Tær vunnu finaluni ímóti SÍ. Dystin um triðja plássið vann Dráttur.*

**Næstsíðsta vikuskiftið skipaði flogbóltsfelagið Fleyr fyri FK-kapping í yngri deildum. Heili 180 dystir vóru á skránni, og á gentusíðuni gjørdist Fleyr stóri vinnarin, meðan TB fekk bestu úrslitini hjá dreingjunum**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyri góðum mánað síðani var FK-kappingin hjá eldri deldum á skránni. Tá gjørdist Mjølnir vinnari hjá monnum, meðan KÍF vann hjá kvinnunum. Næstseinasta vikuskiftið skuldu yngru deildirnar hjá flogbóltsfeløgunum so spæla FK-kapping, og henda kappingin eydnaðist stak væl.

### Fleyr gjørdist stóri vinnarin hjá gentunum

Kappingin fyri yngri deildir byrjaði fríggjakvøldið 10. november, og hetta kvøldið vardi hon heilt til kl. 23 á kvøldi. Leygardagin spældu liðini so frá tíðliga á morgni til langt út á kvøldið. Kappingin var á skránni í Gundadalshøllini, Hoyvíkshøllini og Læraraskúlahøllini.

Hjá gentunum gjørdist havnarfelagið og felagið, sum fyriskipar FK-kappingina, Fleyr, stóri vinnarin. Av teimum fimm deildunum megnaði Fleyr at vinna tríggjar av teimum, og hetta er eitt sera flott úrslit. Fleyr vann hjá gentum 10 gentum ár, gentum 14 ár og gentum 16 ár, so framtíðin hjá Fleyr sær lovandi út.

Hjá gentum 12 ár vann TB a, og hetta var einasta kapping, sum TB vann hjá gentunum. Í elsta aldursbólkinum á gentusíðuni, sum er kvinnuunglingar, megnaði KÍF at vinna. Bæði TB og KÍF vunnu eisini onnur heiðursmerki hjá gentunum, men tað mest sermerktu úrslitið stóð TB fyri.

Hjá gentum 12 ár møttust TB a og TB b í finaluni. Her vann TB a dystin, og sostatt fingu tær gull og TB b fekk silvur. Men hetta var ikki tað einasta, sum TB vann í gentum 12 ár. TB d vann nevniliga bronsudystin, og tískil vann TB heili trý heiðursmerki hjá gentum 12 ár.

### Nógvir vinnarar hjá dreingjunum

Var Fleyr stóri vinnarin hjá gentunum, so var kappingin hjá dreingjunum sera jøvn, har nógv ymisk feløg vunnu deildirnar.

Mest vinnandi felagið hjá dreingjunum gjørdist TB, sum tó bert vann eina kapping. Teir vunnu nevniliga kappingina hjá dreingjum 14 ár, men TB fekk nógv onnur